

Russiski oljurisin Rosneft hevur keypt seg inn í borifelagið North Atlantic Drilling, sum er partur av boringunum í Føroyum. Her leitistjórin hjá felagnum stæddur í Vágsbotni. Myndatrøka Jan Müller

# Russar keypa seg inn felag sum borar í Føroyum

**Jan Müller**

30.05.2014 - 09:56

Oljan.fo

Russiska oljufelagið Rosneft hevur keypt ein part av norska felagnum North Atlantic Drilling, ið er felagið, sum stendur fyri boringunum í Føroyum í ár vegna móðurfelagið Seadrill.

Samstundis hava feløgini gjørt eina samstarvsavtalu um at arbeiða í felag fyri at finna vakstrarmøguleikar í Russlandi. North Atlantic Drilling ella Nadl, sum felagið vanliga verður rópt, hevur frammanundan sáttmála um at bora tveir brunnar fyri Rosneft og ExxonMobil í Karahavinum tey bæði næstu árini.

Gongst sum ætlað, verður samstarvið millum tey bæði feløgini økt nógv í komandi árum. Sambært fráboðan til virðisbrævamarknaðin skulu feløgini gera fleiri langtíðarsáttmálar, sum bera í sær, at pallar hjá Nadl skulu bora fyri Rosneft. Tað ljóðar, at Rosneft fær brúk fyri níggju pallum, og at sáttmálaskeiðið verður 35 ár. North Atlantic Drilling eigur níggju borieindir

Hóast søluna til Rosneft eigur Seadrill framvegis 70 prosent av Nadl, og á virðisbrævamarknaðunum í Oslo og New York er marknaðarvirðið á felagnum umleið 2,1 milliardir dollarar.